## FØÐINGAR

19. sept. fingu Ivy og Napoleon Jacobsen, Glyvrar, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og vigaði 3800 gr.

21. sept. fingu Conny og Sveinur Poulsen, Hvalba, ein son. Hann var 51 cm. langur og vigaði 3580 gr.

23. sept. fingu Bjørg Poulsen og Pauli Hammershøy, Amager, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3452 gr.

26. sept. fingu Jonhild A. Nielsen og Knút H. Nielsen, Øravíkarlíð, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3550 gr.

27. sept. fingu Solby A. Eliasen og Peter J. Eliasen, Klaksvík, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4245 gr.

27. sept. fingu Sonja Tungá og Jónsvein Thomsen, Sandur, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3250 gr.

30. sept. fingu Malan Holm Erlingsson, Tórshavn og Remi Hammer, Hov, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3250 gr.

1. okt. fingu Marta og Eyðun á Lakjuni, Fuglafjørður, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 3500 gr.

2. okt. fingu Annbritt Thomsen og Magni Jacobsen, Vágur, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 3350 gr.

2. okt. fingu Laura í Geil og Ragnvald Joensen, Skálavík, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3270 gr.

4. okt. fingu Ingibjørg Egholm og Jóanes N. Dalsgaard, Streymnes, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 4000 gr.

4. okt. fingu Lydia Thomsen og Jan Olsen, Tórshavn, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3200 gr.

4. okt. fingu Miriann og Bárður Poulsen, Nólsoy, eina dóttur. Hon var 54 cm. long o v vigaði 3740 gr.

## ANDLÁT

27. september
Kristianna Kjærbo, Klaksvík, 63 ár
Petur Meinert Hansen, ættaður úr Klaksvík, búsitandi í Elduvík, 59 ár

28. september
Paula Andreasen, Tórshavn, 81 ár

29. september
Olivar Jacobsen, Fitjar, Vestmanna, 83 ár

30. september
Hanna Eliasen, Leirvík, 87 ár
Jóhannes Arge, Tórshavn, 74 ár

1. september
Jóhan Christian Olsen, vanliga nevndur Giss, Toftir, 66 ár
Hans Petur Joensen, vanliga nevndur Hassi, Kollafjørður, 80 ár
Frida Poulsen, Saltangará, 88 ár

3. september
Eskild Hansen, Sumba, búsitandi í Íslandi, 81 ár

## Læknavaktir

*Tórshavn:*
Læknavaktin tlf. 310033

*Eysturoy:*
Leygardagin 6. okt.: Magnus á Stongum, tlf. 423006
Sunnudagin 7. sept.: Andreas Petersen, tlf. 441086

*Norðoyggjar:*
Læknavaktin tlf. 458888

*Vágar:* tlf. 332413

*Suðuroy* (norður): tlf. 371560
*Suðuroy* (suður): tlf. 373030

*Tannlæknavakt, Tórshavn*
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 13-14. Tlf. 314544.

## TILTØK

**Gudstænastur**
**17. sunnudag e. trinitatis**
*Fríðrikskirkjan:* kl. 11, konfirmatión, Jónsvein Bech
*Miðvágur:* kl. 11, David Johannesen. (Talvan gongur í øllum kirkjum í Vága Prestagjaldi fyri sunnudagsskúlan hjá Heimamissiónini).
*Havnar kirkja:* kl. 11, konfirmatión, Sonja Klein
*Kaldbak:* kl. 12, altarg., Hans J. Joensen, biuskuppur
*Norðskála:* kl. 12, Meinhard Bjartalíð
*Glyvrar:* kl. 11 lestur (Talvan gongur fyri sunnudagsskúlan).
*Rituvík:* kl. 11 lestur (Talvan gongur fyri sunnudagsskúlan)
*Fuglafjørður:* kl. 12,
*Hellur:* kl. 17, altarg., Uni Næs. (Frá komandi sunnudegi verður kirkjutíðin broytt til kl. 12 í Fuglafjarðar prestagjaldi).
*Vesturkirkjan:* kl. 11, Bergur D. Joensen
*Argir:* kl. 11, konfirmatión, Heri Joensen
*Í Vestmanna* kirkju gongur talvan fyri landsarbeiðið hjá sunnudagsskúlunum
*Haldarsvík:* kl. 12, Marjun Bæk.
*Í Kvívíkar* kirkju gongur talvan fyri landsarbeiðið hjá sunnudagsskúlunum.
*Í Kollafjarðar* kirkju gongur talvan fyri Neyðhjálp Fólkakirkjunnar. *Í Kollafirði, Hósvík og Haldarsvík* verður nú farið í kirkju kl. 12.00.
*Christianskirkjan:* kl. 11, konfirmatión, Hans Eiler Hammer
*Haraldssund:* kl. 11, Niels Pauli Danielsen
*Klaksvíkar sjúkrahús:* kl. 10,
*Norðoya Røktarheim:* kl. 14.30, Elsa Funding.
*Viðareiði:* Sunnudagin 7. okt. verður aftur farið í kirkju kl. 12. Tann dagin gongur talvan í Viðareiðis kirkju til frama fyri sunnudagsskúlan hjá Heimamissiónini.
*Hvannasund:* kl. 12, Bjarni Bæk
*Funningur:* kl. 12 messa, Emil Olsen. (Talvan gongur í øllum kirkjum í Eiðis prestagjaldi fyri Sunnudagsskúlan hjá Heimamissiónini).
*Broytt kirkjutíð.* Frá komandi sunnudegi verður farið í kirkju á Eiði og við Norðskála kl. 12
*Norðskála:* kl. 17, altarg., Peter O. K. Olofson
*Skálafirði:* kl. 17, Emil Olsen. (Talvan gongur fyri bønhús).
*Skála:* kl. 11, Jógvan Fríðriksson.
(Í Sjóvar kirkju gongur talvan fyri sunnudagsskúlan hjá HM).
*Skúvoy:* kl. 11, konfirmatión, Jákup R. Hansen. (Talvan gongur í Sandoynni fyri sunnudagsskúlan).
*Hvalba:* kl. 12, Ólavur Rasmussen

**Adventkirkjan**
Leygardagin kl. 10 barnabíbiliutími og bíbliugransking. Evni: Profeturin sum ikki var profetur. Kl. 11 gudstænasta, J. V. Danielsen.

**»Tíð til Gud«**
Úti í Pállsstovu sunnukvøldið kl. 21. Vit fara nú sunnukvøldið at viðgera evnið: »At stíga fram í skarði móti Gudi, landinum til verju, so Hann leggur tað ikki í oyði«. Aftaná er drekkamuður. Verið hjartaliga vælkomin.

**Sjómanskvinnuringurin í Havn**
kemur saman á Sjómansheiminum mánakvøldið 8. okt. kl. 20. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 morgunmøti, kl. 12 sunnudagsskúli og kl. 18 evangel. fundur.

**Meinigheitin í Hoyvík**
Sunnudagin kl. 14 í Hoyvíkar skúla sunnudagsskúli, kl. 17.30 bøn og kl. 18 møti við Gunnvør og Oddmar, tosa verður um: Bønarevangelisering í Bergen.

Mánakvøldið kl. 20 bønarmøti í Høllini, Uppi á Brekku 3. Øll eru vælkomin.

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Sunnudagin kl. 11 møti, Sámal Jákup Joensen talar, kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 17.30 bøn, kl. 18 møti, heimaforbundið stílar fyri, Ása Lützen talar. Drekkamunnur aftaná.
Mánadagin kl. 17 og 19 skótamøti.
Mikudagin kl. 15 bønarmøti.

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Orðsinstænasta við kommunión í Kerit.
Hósdagin kl. 20 verður Taizékvøld (bønarstund við sálmasangi úr Taizé) í bønarrúminum hjá Franciskanasystrunum, Varðagøta 16. Øll eru vælkomin
Leygardagin kl. 11.30 messa í Kerit.
Sunnudagin kl. 11 hámessa v/ Michael Bienkowski í Mariukirkjuni. Aftaná verður kirkjukaffi.

**KFUM og KFUK í Havn**
Mánadagin kl. 15 í KFUK: Eldrasamkoman við Høgna Poulsen presti. Evni: Dómarabókin.

**Ebenezer**
Sunnudagin kl. 10 breyðbróting, kl. 12 sunnudagsskúli, kl. 18 endar møtirøðin við Poul Færø, evnið: Fylgið Mær, so skal Eg gera tykkum til menniskjafiskimenn. Kl. 21 útimøti.
Mánadagin kl. 20 bønarmøti.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Meinigheitshúsið**
Leygardagin kl. 15.30 Bønarløta, kvinnur.
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti v/ Torstein Johannesen.
Mánakvøldið kl. 20 venur Manskórið.

**Filadelfia**
*Landavegur 22*
Í dag 17 landsbøn.
Í morgin kl. 11 morgunmøti v/ Símun Absalonsen, kl. 11.30-12.45 barnagudstænasta, kl. 18 kvøldmøti v/ Alex O'Campo, kl. 22 útimøti v/ Evangeliihúsinum.
Mánakvøldið kl. 20 bønarskúlin.
Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

**Hvítusunnusamkoman**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, kl. 18: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Samkoman Immanuel**
Sunnudagin kl. 13 sunnudagsskúli, kl. 17 møti.

**Rhema á Hálsi**
Mikukvøldið kl. 20 húsmøti hjá Edith og Jónfinn Petersen, Leitisgøta 11, (Á Hamrinum), Argir.
Fríggjakvøldið kl. 18-19.30 A.T.A.P. Kids.
Leygarkvøldið kl. 20 Next generation (ungdómsmøti).
Sunnudagin kl. 17 møti. Øll eru vælkomin.

**Saron, Vestmanna**
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti v/ breyðbróting.
Mánadagin kl. 20 bíbil- og bønarmøti.
Telefonandaktin: 424741.

**Vestmanna missiónshús**
Sunnudagin kl. 14.30 sunnudagsskúli og kl. 18 møti við kollfirðingum við sangi og talu.

**Missiónshúsið Karmel, Eiði**
Emil Olsen, prestur, heldur fyrilestur í missiónshúsinum Karmel sunnukvøldið kl. 19. Evni: Missión, kirkja og embæti.

**Filadelfia, Sundalagi**
Í morgin kl. 18 Alpha-skeið í Unitum í Kollafirði.

## EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

*Um rættvísi tykkara ikki ber av rættvísi teirra skriftlærdu og farisearanna, kom tit als ikki inn í himmiríkið (Matt. 5,20)*

Eingin menniskjans rættvísi letur upp himmiríksi dyr. Vit hava oftani lyndi til at halda, at hetta er tí, at hon ikki er verulig rættvísi. Til dømis halda vit, at rættvísin hjá farisearunum bert var nakað útvortis, at teir allir sum ein vóru hyklarar, ið lótust vera rættskafnir, men vóru tað ikki. Rætt er tað, at Jesus oftani førir fram tílíkar atfinningar móti teimum. Men tað reingir kortiniikki tann veruleika, at tað millum fariserarnar vóru menn, sum av øllum alvi royndu at liva lív sítt eftir Guds lóg. Mangir teirra vóru hampamenn, sum høvdu sett sær sum mál at liva eftir Guds vilja. Og endamálið var ein dag at kunna standast fyri Guds dómstóli. Teir vistu, at ein dag kom leið teirra at bera hagar, og tá ráddi um, at lívið varð livað soleiðis, at Gud kundi kennast við teir. Tann rættvísin, sum teir høvdu útvegað sær við at halda Guds lóg, hon skuldi saman við Guds fyrigeving bjarga teimum tann dag, tá ið teir stóðu andlit til andlits við Gud. Og júst tí var stremban teirra at halda Guds lóg álvara og ikki kávalæti.

Hetta var tá, og hetta er enn í dag menniskjans rættvísi. Vit kunnu skifta um orðini, hvør rættvísina eigur, men rættvísin sjálv verður hin sama. Men henda rættvísin er ikki týdningarleys, sum ein mangan kann fáa varhuga av, tá ið talað verður um hana í hesum samanhangi. Munurin er altíð ovur stórur á einum rættvísum og einum órættvísum samfelagi. Tí vita tey at siga frá, sum liva hava í einum samfelag, har eingin rættvísi var, men har hin sterkasti ella tann við teimum røttu meiningunum hevði rætt. Men hvussu týdningarmikil henda rættvísin enn er, hon kann tó aldrin lata upp hurðina inn til Guds ríki.

Tí talar Jesus eisini um eina aðra rættvísi, eina rættvísi, ið ber av hesari. Men hann talar ikki um eina enn fullkomnari rættvísi, sum menniskjað við sínum góðu gerningum kann útvega sær. Tí eisini hon er og verður menniskjans egna rættvísi, og sum slík kann hon ikki lata upp himmiríkis dyr. Hurðina inn til Guds ríki kann bara Gud lata upp fyri menniskjum, og bara fyri Jesu Krists skuld og rættvísi hansara verður hon ein dag latin upp. Tí menniskjans rættvísi fær ongantíð brúk fyri evangeliinum; lógin er, og lógin verður henni nóg mikið.

Tað finst sostatt ein rættvísi, sum letur upp hurðina inn til Guds ríki fyri menniskjum. Og henda rættvísi er Jesu Krists rættvísi. Til Guds kemur eingin uttan eftir náðinnar smala vegi, og tí er alt tað, sum vit sjálvi royna at gera fyri at vinna okkum Guds ríki einans ein minking av heiðuri Jesus Krists, so satt sum hann longu hevur gjørt alt, ið neyðugt er. Evangeliið til okkara er, at tað finst ein náðivegur. Fyri Jesu Krists skuld vil Gud hava við okkum at gera og longu í dópinum bjóðaði hann okkum lut í lívinum saman við sær. Taka vit ímóti innbjóðing hansara, velja vit at liva lívið í áliti á lyfti hansara um, at hann hevur syrgt fyri okkum og vil syrgja fyri okkum og ævigu lagnu okkara bæði her og hinumegin, tá eru vit á teirri leið, sum ein dag ber heim í faðirhúsið. Amen.

**Hans Jacob Joensen**



## TILTØK

Mikudagin kl. 17.30-19.30 Miðdepilin. Hósdagin kl. 16-17.30 Urtagarðurin.

**Missións- og ungdómshúsið á Glyvrum**
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, og kl. 18, *legg merki til kl. 18*, verður møti við Marin Elisabeth Poulsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Ørkin, Saltangará**
Evangel. møti verður sunnudagin kl. 17 við Dánjal Gaardlykke, Saltangará.
Húsmøti verður týsdagin kl. 19 hjá Charles og Anthony Johansen, Saltangará.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21 opið hús.
Sunnudagin kl. 17 møti við Hans Jacobsen. Barnamøti kl. 17. Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

**Meinigheitshúsið á Skála**
Sunnudagin kl. 13.30 sunnudagsskúli, kl. 19 møti v/ Regin og Hellu Olsen, lovsangsbólkurin luttekur. Bjóðað verður til drekkamunn. Innsavnan til húsið. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Aglow, Klaksvík**
Møti verður í Bøgøtu 3 fríggjakvøldið 5. okt. kl. 20. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

**Soli Deo Gloria**
Mikumorgun kl. 6 bøn.

Hóskvøldið kl. 20 ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti.
Mánakvøldið kl. 20 bønarmøti.

**Lívsins Orð**
Sunnudagin kl. 10.30 er møti við Kurt Nielsen.
Liljurnar møta mánadagin kl. 17 og ungdómsbólkurin kl. 20.30. Øll eru vælkomin.

**Missiónshúsið, Skopun**
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 17.30 lovsangsmøti, kl. 18 møti.

**Betania, Skopun**
Sunnudagin sunnudagsskúli – Bíbilfl. kl. 10.15, morgunmøti kl. 11. Kvøldmøti verður í Zion á Sandi kl. 18 – Kurt og Karen luttaka. Øll eru vælkomin.

**Zion, Sandur**
Sunnudagsskúli kl. 13.30, kl. 18 kvøldmøti – Karen og Kurt luttaka. Øll eru vælkomin.

**Sands missiónshús**
Sunnudagsskúlin er nú kl. 14.30. Sunnukvøldið kl. 18 møti, Manskórið syngur. Øll eru vælkomin.

**Café One Way, Tvøroyri**
Fríggjakvøldið kl. 21 mansmøti, Jónhard Joensen, stýrimaður á Anastasis talar, allir menn eru hjartaliga vælkomnir.

**Aglow, Suðuroy**
Møti verður leygarkvøldið kl. 20 í Café One Way, Debbie Joensen av Anastasis talar. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

**Missiónshúsið, Tvøroyri**
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti við Jacob Poulsen og Katrina, Ebba og Nimrod syngja. Innsavnan verður til húsið. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Betel, Vágur**
Sunnudagin kl. 11 breyðbróting, kl. 13.30 sunnudagsskúli, kl. 18 evangel. fundur. Kl. 21 útifundur um viðrar.
Mánadagin kl. 20 bønarfundur.
Týsdagin kl. 20 ungdómsfundur.
Ónsdagin kl. 20 uppbyggingarfundur.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 evangel. møti við Palla Petersen.

Mánadagin kl. 20 Heimaforbundið. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 212380.

**AA-fundir í Havn**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Roykfríur fundur í morgun kl. 9-10. Fundur verður í kvøld kl. 17-18 og sunnudagin kl. 11-12.

**Opin AA-kvinnufundur í Havn**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Sunnukvøldið kl. 20.
**VBA** (Vaksin børn til alkoholikara) ella ørkymlandi familjuumstøður. **Opin** fundur sunnudagin kl. 17.

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

## 75 ÁR

Sunnudagin 7. oktober verður Bettemi Egilstrøð á Eiði 75 ár. Dagurin verður hildin leygarkvøldið 6. oktober.

## 80 ÁR

Mánadagin 8. oktober verður Lena Dahl, Toftir, 80 ár.

## BRÚDLEYP

Í dag, 6. oktober giftast Elisabeth R. Djurhuus og Birgir Nónsgjógv.

Í dag, 6. oktober giftast í Leirvíkar kirkju Malan Jacobsen, Leirvík og Øssur Steinhólm, á Nesi. Veitslan verður í B68-húsinum á Toftum fyri innbodnum kl. 19.00.

Í dag, 6. oktober, giftast Sigrid Joensen og Joen Peter Petersen, Skálavík. Brúdleypið verður hildið í Skálavík.

Leygardagin 13. oktober kl. 15.00 giftast í Vitninum í Hvalba Jóna Miné Midjord og Dánjal Jóhan Thomsen. Vælkomst verður í skúlanum í Trongisvági kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma í brúdleyp vera vinarliga biðin um at siga frá áðrenn 7. okt. á tlf. 375340 ella 375019.

Leygardagin 13. okt. kl. 16.00 giftast í Glyvra kirkju Hanna á Regni á Toftum og Hilmar Sam Lamhauge av Glyvrum. Veitslan verður hildin í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00. Øll, ið vilja gleða brúðarparið við at vera við, verða biðin um at tekna seg á tlf. 447740, 447995 ella 223818 í seinasta lagi 6. oktober.

Leygardagin 10. november kl. 16.00 giftast í Christianskirkjuni í Klaksvík Maiken Midjord og Eyðbjørn Høgnesen, bæði úr Klaksvík. Vælkomst verður í Skálanum kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma í brúdleyp, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 457656, 456036 ella 455956 áðrenn 29. oktober.

## GULLBRÚDLEYP

Týsdagin 2. oktober 2001 *høvdu* Kathrina og Karl Johan Mikkelsen, Tórshavn, gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í dag hjá dóttrini á Mikkjalstrøð 18, Tórshavn.

## KONFIRMATIÓN

í Argja kirkju sunnudagin – adressan var komin skeift fyri.
Hans Jákup Dam, Traðargøta 25, Argir


